BLÁI STÓLURIN

# Oddfríður Marni Rasmussen, rithøvundur, 36 ár



# »Eg spegli mær í 27 sekund«

**Lýs teg sjálvan við trimum orðum:**
Treiskur, sjálvironiskur og róligur.

**Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?**
Put it there, if it weighs a ton og fínt.

**Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?**
Eg hyggi at øllum, sum lýsir eitt sindur av sjarmu. Tað kann vera so nógv. Eitt móðurmerki, smílið, eygnabragdið. Alt sum ikki ger kvinnuna bráðvakra, tí at tað er troyttandi at hyggja at; nakað sum at hyggja eftir einum vatnglasi.

**Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?**
Eg brúki ein minutt at lata meg í, tveir minuttir at busta tenn og tveir minuttir at pissa.

**Hvat stressar teg?**
Ikki nógv, men um eg leggi meg við síðuna av unnustu mínari og varnist, at okkurt er, sum eg ikki havi fingið gjørt nøktandi, ja, so kann eg kenna eitt vet av strongd, men tað er onki, sum fær pulsin at sláa dupult.

**Hvat gleðir teg?**
Eg plagi at gleðast um at vakna um morgunin, og at koma heim til míni kæru eftir ein langan og stravnan arbeiðsdag. Tað er heldur ikki so galið, tá ið eg havi skrivað okkurt, sum er gott. Tá hendir tað seg, at eg gerist so fegin, at eg fái mær eina øl.

**Nær feldi tú seinast eitt tár?**
Eg minnist ikki rættiliga, men helst á onkrari jarðarferð. Tær hava tað við at gerast so syrgiligar, at eg ikki fái stýrt tárunum.

**Nær smakkaði tú tær seinast á?**
Tú, fríggjakvøldið fekk eg mær nakrar øl og ein Job (J&B)

**Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?**
Tað var, tá ið bókin við plástrinum kom á marknaðin.

**Hvar arbeiðir tú?**
Tá ið eg ikki arbeiði á Frítíðarskúlanum Stoffalág 60, skrivi eg. Og øvugt. Annars er lívið fult av fundum.

**Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at gerast rithøvundar?**
At vera áhaldandi og treiskur, at geva sær góðar stundir.

**Hvat er besta uppfinningin og hví?**
Tað er uttan iva klemman og blandimaskinan/uppvaskimaskinan.

**Hvat hevur tú í lummunum beint nú?**
Eg havi lyklar, felliknív, penn, pappír og ein ljósareyðan tendrara.

**Hvat er títt besta heimaráð?**
Hvess knívarnar væl.

**Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?**
Unnustan Rannvá, tá ið hon er í essinum, tí at hon dugir at siga tað, sum sigast skal á ein so skemtandi og lívligan máta, at tú gerst yvirraskaður og næsta stigið er látur, ja, viðhvørt krampi.

**Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?**
Tað er uttan iva Jóannes Eidesgaard. Hann hevur eitt talent, tá ið talan er um at síggja keðiligur út, og so dugir hann eins væl og Landsbankastjórin at siga okkurt, sum ikki rínur við.

**Hvussu ofta speglar tú tær?**
Hvørja ta evigu einastu ferð, eg hyggi í spegilin. Umleið 27. sekund um dagin. Eru nøkur long nasahár; eini 49. sekund.

**Hvussu ofta ert tú hjá frisør?**
Seinast, eg var og skar mær av hárinum, var fyri tveimum árum síðani, tá ið sonur mín Mikkjal varð doyptur. Næstseinast var fyri átta árum síðani, tá ið hin sonur mín Bartal varð doyptur. Annars plagar unnustan at raka mær grúkin við einum trimmara, sum eg láni frá sjeikinum hjá svigarinduni.

**Hvør er tín stuttligasta uppliving sum rithøvundur?**
Tað var, tá ið eg á Listastevnu Føroya saman við amerikanska yrkjaranum Ron Padgett las upp á Kálvmannarætt við Sandsvatn. Ein søgulig og stuttlig uppliving.